# Avstað við oksa og bjørn

Grønland var landið, ið hesaferð stóð sum fyriskipari av Vestnorden Travel Mart, men enn einaferð valdu grønlendingar at hava stevnuna í Keypmannahavn. Við sær á hotellinum høvdu teir ein útstappaðan oksa og eina útstappaða ísbjørn, sum annars hava sítt fasta pláss á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn. Nú ferðavinnustevnan á hesum sinni er lokin, eru teir í holt við at flyta hábærsligu dýrini burtur aftur. Oksin stendur fremst inni í bilinum, og í hinari síðuni – sum ikki sæst – liggur ísbjørnin.






# Vestnorden Travel Mart – og hvat so?

**Nú almennu Føroyar ætla at brúka 9 miljónir krónur um árið í trý ár til marnaðarátøk innan ferðavinnu, skal kósin setast – hvagar vit skulu leita, og hvørjum vit skulu leita eftir**

TRAVEL MART
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stóra ferðavinnustevnan, Vestnorden Travel Mart, sum Føroyar, Grønland og Ísland eru saman um, er liðug á hesum sinni.

Stevnan varð hildin í Keypmannahavn mikudagin og hósdagin í síðstu viku. Tað var Grønland, sum hesaferð átti heiðurin sum vertland, men grønlendingar valdu enn einaferð at hava stevnuna í Danmark.

Íslendingar vóru nógv best umboðaðir við umleið 80-90 útbjóðarum, á øðrum plássi var Grønland við eini 18 útbjóðarum og síðan Føroyar við umleið 12 útbjóðarum.

Hetta eru alt ymisk feløg, sum hava við ferðavinnu at gera - hotellir, gistingarhús og flutningsfeløg.

Vestnorden Travel Mart varð hesaferð skipað á tann hátt, at tað vóru keyparar, sum lótu fyrireikararnar vita, hvønn tey vildu hitta á stevnuni, og síðan vórðu fundir avtalaðir partanna millum eftir ávísum skifti.

Ein týðandi táttur á slíkum stevnum er at hitta samstarvspartar, sum longu eru í samstarvi – og síðan at hyggja eftir nýggjum møguleikum.

Tað er felagsskapurin NATA (North Atlantic Turism Association), sum stendur aftanfyri hetta stóra ferðavinnutiltak, sum londini í útnorði eru saman um.

Formaður í NATA er føroyingurin, Per Hansen, og felagsskapurin verður fíggjaður við hvør sínum 500.000 krónum úr Føroyum og Grønlandi og einari miljón úr Íslandi.

Vestnorden Travel Mart er annað hvørt ár í Íslandi, og annað hvørt ár í Grønlandi ella Føroyum. Næsta ár verður stevnan aftur í Íslandi.

Umframt føroysku útbjóðararnar, vóru bæði landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum, Jørgen Niclasen, leiðarin á ferðavinnudeildini í uttanríkisráðnum, Súsanna Sørensen og onnur almenn føroysk ferðavinnuumboð við á stevnuni.

Súsanna Sørensen heldur, at Føroyar eiga at marknaðarføra seg, har vit halda, at møguleikarnir fyri at fáa fleiri ferðafólk hendan vegin eru bestir, og í hesum sambandi heldur hon, at Danmark, Bretland og Týskland eru bestu boðini. Onnur áhugaverd lond eru eitt nú Italia og Háland.

- Ein vansi er, at vit hava ikki nóg góð hagtøl, og tí er torført at meta um, hvørji átøk eydnast væl, og hvørji kanska eydnast minni væl, sigur Súsanna Sørensen, leiðari á ferðavinnudeildini í uttanríkisráðnum.

Hon heldur annars, at stórir vakstrarmøguleikar eru innan føroyska ferðafólkavinnu. Hetta er ein vinnugrein, sum saktans kann koma at geva uppaftur meira útlendskan valuta til landið, enn hon ger í dag.

Landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum, Jørgen Niclasen, sigur, at ætlanin er at seta av 9 miljónir krónur um árið í trý ár til tess at marknaðarføra Føroyar sum ferðafólkaland, serliga úti, men eisini heima, so føroyingar í enn størri mun kunnu síggja møguleikarnar í at ferðast í egnum landi.

Súsanna Sørensen sigur, at tey í uttanríkisráðnum nú eru farin í holt við at gera eina handlingsætlan fyri, hvussu Føroyar skulu marknaðarførast.

– Hetta er ein ætlan, sum vit fara at leggja saman við ferðavinnufelagnum og ferðavinnuni annars. Her verður hugt at, hvørjum marknaði vit skulu fara eftir, og hvørjum fólkum vit skulu fara eftir á hesum marknaðum – og hvussu vit kunnu røkka teimum, sigur leiðarin á ferðavinnudeildini í uttanríkisráðnum.

---

segði íslendski ferðavinnuráðharrin, Katrín Júlíusdóttir, at eini 12% fleiri ferðafólk hava vitjað í Íslandi í ár enn somu tíð í fjør.

Jóan Karl sigur, at Ørkin hevði umleið 7.000 gistingar í fjør, og hann heldur, at talið av gistingum í ár verður minst líka so stórt.

– Jú, vit hava eisini merkt, at fleiri ferðafólk hava vitjað í Íslandi í ár enn í fjør, og vit hava ikki havt minni at gera í ár.

Hann ásannar, at ein orsøkin til veksandi ferðafólkatalið er lága íslendska krónuvirðið saman við tí forvitni, sum nógva umrøðan hevur skapt um landið, ið hevur verið so hart rakt av fíggjarligari kreppu.

– Vit hava tó ikki merkt nakað serligt til kreppuna í Íslandi.

Jóan Karl sigur, at tá hann kom til Íslands at

Arbeiða fyri hálvum øðrum ári síðan, stóðu nógvir stórir kranar og sveiggjaðu í sambandi við ta nógva byggivirksemi, sum var.

– Í dag er at kalla alt hetta virksemi steðgað upp, og tú sært neyvan ein tann einasta krana flyta seg. Soleiðis standa eisini nógvir bygningar hálvlidnir.

Leiðarin á Ørkini sigur, at sjálvandi skilja tey á fólki, at nógv hava mist arbeiði, og at peningurin røkkur ongan veg.

– Nógv fólk eru soleiðis í eini truplari støðu, leggur hann aftrat.

> *”- Í dag er at kalla alt virksemi steðgað upp, og tú sært neyvan ein tann einasta krana flyta seg. Soleiðis standa eisini nógvir bygningar hálvlidnir...”*
>
> *(Jóan Karl Høgnesen)*

### Pensjóneraður

Jóan Karl Høgnesen fór í starv sum leiðari á Ørkini í Reykjavík eftir, at hann var vorðin pensjóneraður.

Í samfull 23 ár tilsamans starvaðist hann hjá donsku sjóverjuni – í fleiri ár sum yvirmaður og skipari, men hann hevði eisini onnur størv, sum høvdu tilknýti til donsku sjóverjuna. Soleiðis starvaðist hann eisini á Marinustøðini í Føroyum í eini trý ár.

– Í nøkur ár var eg leiðari í sonevnda ”situatiónsrúminum” á flotastøðini hjá sjóverjuni í Frederikshavn, og í hesum tíðarbili var eg eitt hálvt ár í Irak, har vit vóru partur av serligari deild, sum skuldi hjálpa lokala fólkinum í Irak í gongd aftur. Eg hevði tá stutt frammanundan starvast í eitt ár á markinum millum Kuwait og Irak.

Jóan Karl Høgnesen sigur, at hann hevur havt eitt ávíst tilknýti til sjómansmissiónina, og hann hevur altíð havt áhuga fyri tí arbeiði, sum sjómansmissiónin ger. Ígjøgnum árini, sum siglandi, hevur hann eisini havt eitt ávíst tilknýti til sjómansheimini.

– Eg helt tí, at tað kundi verið áhugavert at tikið eitt tørn á Ørkini í Reykjavík, og tað havi eg so gjørt. Ætlanin var í fyrsta lagi at vera á sjómansheiminum í tvey ár. Um eg komi heim aftur komandi summar – ella, um eg verið her nakað longri, fer tíðin at vísa, sigur leiðarin á Hotel Sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík í práti á Vestnorden Travel Mart.